# Álit

# í

**løgtingsmáli nr. 29/2024: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (Eyka skatt á alifeløg)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 4. november 2024, og eftir 1. viðgerð 15. november 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20., 26. og 28. november og 13. desember 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsbankan, Havbúnaðarfelagið, Búskaparráðið og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu, Hanna Jensen og Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Meirilutin staðfestir, at hetta uppskotið um broyttan felagsskatt fyri yvirskot av sjógvaling er partur av breiðu semjuni millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi, Framsókn og Sambandsflokkin um gjald fyri framíhjárættindi hjá feløgum, sum hava fingið møguleika at brúka firðir og annað í Føroyum í samband við laksaaling.

Í arbeiðinum at finna semjuna, sum varð undirskrivað 26. mars 2024, vóru flokkarnir umboðaðir av forfólkunum og umboðunum í Vinnunevndini. Fyri summarfrítíðina varð parturin um tøkugjaldið samtyktur av flokkunum í avtaluni, meðan hesin síðsti parturin av skipanarligum orsøkum liggur hjá Fíggjarnevndini. Tí hevur meirilutin í Fíggjarnevndini viðgjørt hetta sum eitt mál, sum er úrslit av einari frammanundan gjørdari semju, og hevur tí verið afturhaldandi við at leggja upp til tillagingar, men hevur lagt dent á at lýsa møguleikar og avleiðingar, áðrenn málið verður samtykt.

Í samband við lýsingina av málinum ásannar meirilutin, at tað er munur á uppskotinum, sum var í hoyring, og tí uppskoti, sum nú verður viðgjørt. Tí eru fleiri partar av hoyringarsvarum til hetta uppskotið ikki viðkomandi longur. Størsti munurin í mun til fyrru útgávuna er, at tað ikki verður talan um ein serligan skatt fyri framíhjárættindini í allari framleiðsluni, men bert fyri tann partin, sum snýr seg um aling á sjónum. Fyri at samlaða gjaldið fyri framíhjárættindini skal vera tað sama fyri henda minna partin av framleiðsluni, hevur landsstýrið mett, at gjaldið eigur at hækka frá 8 prosentum í eyka partafelagsskatti av avlopinum fyri alla framleiðsluna til 12 prosent fyri tann partin av framleiðsluni, sum er á sjónum.

Samráðingarumboðini fyri allar fýra flokkarnar í semjuni hava tikið undir við hesi tillaging.

Bæði landsstýrið, Landsbankin og Búskaparráðið meta tað vera rættari, at skattingin fer fram fyri partin av virkseminum, sum er á sjónum, meðan umboð fyri alivinnuna undir viðgerðini hava nevnt ta broytingina vera ein munandi bata.

Alivinnan hevur tó undir hoyringunum ført fram, at samlaðu gjøldini verða ov høg, og at hendan skipanin undir vanligum umstøðum kann verða eitt økt gjald samanborið við skipanina, sum varð samtykt í fjør.

Tó er greitt, at javnara tøkugjaldið, sum ikki er partur av hesum uppskotinum, men longu er samtykt, minkar um vandan fyri, at portiónsframleiðsla í Føroyum verður vald frá. Umframt hetta hevur eyka partafelagsskattur fyri atgongd onga ávirkan á, hvør framleiðsla kastar meira av sær enn onnur.

Bæði Landsbankin og Búskaparráðið hava undir viðgerðini víst á, at samlaða gjaldið als ikki stendur mát við virðið á framíhjárættindunum, sum fylgja við atgongdini hjá alivinnuni til firðir og annað í Føroyum. Búskaparráðið hevur leysliga mett, at talan kann vera um, at hendan skipanin ásetir eitt gjald, sum er umleið helvtina av virðinum á atgongdini, sum alivinnan hevur. Bæði Landsbankin og Búskaparráðið hava víst á, at landið eigur at áseta gjøld á alivinnuna, sum svara til fulla virðið á atgongdini.

Tá talan er um at skatta ein part av virkseminum hjá fyritøkum og ikki aðrar, kann hetta hava við sær, at fyritøkur royna at tryggja sær, at so lítið av virkseminum sum gjørligt verður fevnt av hægra skattinum. Tí er greitt, at tað sannlíkt gevur størri uppgávur til skattamyndugleikan. TAKS hevur undir viðgerðini víst á, at tey megna at hava hetta eftirlitið.

Undir hoyringunum og rímiliga seint í tilgongdini at evna hetta lógaruppskotið til hevur alivinnan fregnast um møguleikan at gera nakrar skiftisreglur. Eftir at hava reist spurningin fyri landsstýriskvinnuni er ein viðgerð av hesum spurningi farin fram í Fíggjarmálaráðnum.

Fíggjarmálaráðið er komið eftir, at uppskotið hevur við sær, at útsettur skattur hjá alifeløgunum hækkar munandi. Hugtakið útsettur skattur er ikki viðkomandi fyri uppgerð av skattskyldugu inntøkuni, men skal upplýsast í ársroknskapinum sambært ársroknskaparlógini. Fyri alivinnuna merkir tað m.a., at úrslitið eftir skatt ávirkast munandi í 2025. Atlit til hesi viðurskifti kunnu takast í skiftisreglu.

Alifeløg kunnu draga kostprísin fyri aling av fiski á sjónum frá skattskyldugu inntøkuni, so hvørt framleitt verður sbrt. undantakinum í § 26, stk. 3, 2. pkt í skattalógini. Hesar treytir eru meira lagaligar enn skattliga meginreglan um, at framleiðslukostnaður kann dragast frá, tá vøran verður seld. Tað hevur við sær, at alifeløg hava ein útsettan skatt fyri fiskin í sjónum, sum onnur feløg ikki hava fyri sína goymslu.

Hesi viðurskifti hava ikki í sjálvum sær ta avleiðing, at higartil útsettur skattur fellur til gjaldingar.

Hugtakið útsettur skattur er ikki viðkomandi fyri uppgerð av skattskyldugu inntøkuni, men skal sum nevnt upplýsast í ársroknskapinum.

Fyri at útsetti skatturin skal fella til gjaldingar, krevur tað, at goymslan av fiski í sjónum minkar, ella at frádrátturin í § 26 lækkar ella verður strikaður. Tað kann hava við sær, at skattskylduga

inntøkan av goymsluni av fiski í sjónum verður skattað við 30%, meðan kostprísurin fyri goymsluna fram til 31.12.2024 er drigin frá til eitt virði á 18%.

Tí hevur landsstýriskvinnan við skrivi til nevndina, ið liggur sum nevndarskjal í málinum, skotið upp at gera eina skiftisreglu um, at virðið á fiski í sjónum pr. 31. desember 2024 verður gjørt upp til kostprís. Eyka skatturin á 12% verður við hesum lagdur á virðisøkingina á fiski í sjónum frá og við inntøkuárinum 2025, og neyðugt verður ikki at avseta eyka útsettan skatt í roknskapinum fyri verandi alifisk í sjónum, tá lógin kemur í gildi.

Skattliga avleiðingin av hesum er, at tað einans verður tann parturin av alifiskinum í sjónum, sum fer upp um kostvirði pr. 31.12.2024, sum skal gjalda tilsamans 30% í skatti, tá aligoymsla av livandi fiski í sjónum, sum frádráttur áður er fingin fyri, verður inntøkuførd í skattaroknskapinum.

Skotið verður upp at brúka kostprísin, so samsvar er millum skiftisregluna og tað virðið, sum verður nýtt sambært § 26 í skattalógini.

Skiftisreglan fevnir ikki um materiella støðisogn og loyvir. Virðisásetingin av hesum aktivum er meira trupul enn fyri fiskin í sjónum og krevur neyvari viðgerð, møguliga í sambandi við eina endurskoðan av samlaðu reglunum um avskrivingar o.a. Skiftisreglan tekur við hesum atlit til tey serligu viðurskifti, sum eru galdandi fyri goymslu av livandi fiski hjá alifeløgunum sambært § 26 í skattalógini.

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at skiftisreglan broytir metingina um fíggjarligu avleiðingarnar í uppskotinum við verandi fortreytum.

Tá aligoymsla av livandi fiski í sjónum verður inntøkuførd, skal tann partur av aligoymsluni, sum frádráttur seinast er fingin fyri, inntøkuførast fyrst (sonevnda LIFO, ella Last-In-First-Out meginreglan). Virðið á goymsluni pr. 31.12.2024 ávirkar sostatt ikki skattliga úrslitið, tá fortreytin er, at verandi virksemi hjá alifeløgunum heldur fram sum higartil og veksur, soleiðis sum allar forsagnir geva ábending um.

Meirilutin tekur undir við at innføra umrøddu skiftisreglu við tí uppskoti til broytingaruppskot, sum landsstýriskvinnan hevur borið nevndini, og setir tí fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

§ 2 verður orðað soleiðis:

**"§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025.
*Stk. 2.* Eykaskattur skal ikki rindast av virðinum á aligoymslu í sjónum gjørt upp til kostprís pr. 31. desember 2024. Tá aligoymsla í sjónum verður inntøkuførd, og sum frádráttur áður er fingin fyri, skal tann partur av aligoymsluni, sum frádráttur seinast er fingin fyri, inntøkuførast fyrst (LIFO-prinsippið)."

**Viðmerkingar til broytingaruppskotið:**
Við hesum broytingaruppskoti verður gjørd ein skiftisregla um, at virðið á fiski í sjónum pr. 31. desember 2024 verður gjørt upp til kostprís. Eyka skatturin á 12% verður við hesum lagdur á virðisøkingina á fiski í sjónum frá og við inntøkuárinum 2025, og neyðugt verður ikki at avseta eyka útsettan skatt í roknskapinum fyri verandi alifisk í sjónum, tá lógin kemur í gildi.

Skattliga avleiðingin av hesum er, at tað einans verður tann parturin av alifiskinum í sjónum, sum fer upp um kostvirði pr. 31.12.2024, sum skal gjalda tilsamans 30% í skatti, tá aligoymsla av livandi fiski í sjónum, sum frádráttur áður er fingin fyri, verður inntøkuførd í skattaroknskapinum.

Kostprísur verður brúktur til tess, at samsvar skal vera millum skiftisregluna og tað virðið, sum verður nýtt sambært § 26 í skattalógini.

Skiftisreglan fevnir ikki um materiella støðisogn og loyvir.

Tá aligoymsla av livandi fiski í sjónum verður inntøkuførd, skal tann partur av aligoymsluni, sum frádráttur seinast er fingin fyri, inntøkuførast fyrst (sonevnda Last-In-First-Out meginreglan).

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Beinir Johannesen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið er partur av einari semju, ið hevur tveir tættir. Ein eyka partafelagsskatt og tøkugjald.

Eitt tað fyrsta hendan samgongan gjørdi, var at fjórfalda tøkugjaldið, og hevði tað stóra ávirkan á alivinnuna, og kostaði tað eisini hundraðtals arbeiðspláss.

Síðan er lagt upp til ein nýggjan leist við hesum báðum tættunum, ið er eyka partafelagsskattur og tøkugjald. Av hesum er tann størri parturin, ið verður goldin, tøkugjald. Tøkugjaldið er atferðarstýrandi, og tað kann gera, at vinnan gerst meir afturhaldin við váðafúsum íløgum.

Við hesum nýggja leistinum hækkar skattatrýstið á alivinnuna munandi. Skattatrýstið er nógv hægri enn í grannalondum okkara, og tí skaðar tað kappingarførið hjá okkara alivinnu. Tí kann tað sigast at vera steinur omaná byrðu.

Nýggi leisturin skattar eisini harðast, tá prísurin er lægst. Tá er skattatrýstið hægri, enn núverandi tøkugjald er. Prísurin skal rættiliga langt upp, áðrenn skattatrýstið er lægri enn í dag. Upplýst er fyri nevndini, at hyggur man aftur í tíð, er tað ikki oftani, at sølprísurin liggur so langt uppi. Tí er tað ikki sannlíkt, at man fær lægri skattatrýst, enn tað man hevur í dag.

Tað er gjørd ein langtíðarsemja, ið skal vara í minst átta ár. Tað er ein stórur váði í at gera eina skipan, ið skattar harðast, tá lønsemið er minst, og sum ikki skal broytast í minst átta ár. Talan er ikki um eina góða skipan, ið skapar støðugar karmar fyri vinnuna. Fortreytir kunnu broytast. Bæði tá tað kemur til marknaðin og tann lívfrøðiliga partin. Ein langtíðarsemja eigur at taka hædd fyri, at gongdin kann sveiggja, og tað ger hendan semjan ikki.

So samanumtikið er nýggi leisturin ikki ein bati fyri vinnuna.

Minnilutin er tí av teirri fatan, at tað einasta rætta er, at gjørd verður ein skipan, har øll serskattingin av alivinnuni verður løgd oman á verandi partafelagsskatt.

Minnilutin mælir til at fella uppskotið, samstundis sum heitt verður á landsstýrið um at koma við eini skipan, sum er grundað á partafelagsskatt.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 13. desember 2024**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðgunn Samuelsen<br>forkvinna | Beinir Johannesen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Eirikur í Jákupsstovu | Hanna Jensen | Magnus Rasmussen |
| | Steffan Klein Poulsen | |